


# Fiskivinnuroyndir 2021-2023

## Søla av royktum pelagiskum fiski til heimsmarknaðin

## Endalig frágreiðing frá verkætlanini



SJÓGÆTI
Fresh from Faroe Islands
Garðsvegur 7 | 470 Eiði | V-tal: 4912
Tel.: +298231601 | t-postur: hm@sjogati.fo

## Innleiðing/Bakgrund

Sjógæti framleiðir roykt makrel- og sildafløk. Hendan framleiðslan byrjaði varliga í 2020, eftir umfatandi út- og umbyggingar av framleiðsluhølum og útgerð á nýkeypta virkinum á Eiði. Sjógæti hevði tó frammanundan eisini drúgvar royndir við royking av vørum á virkinum á Norðskála.

Fyrsti partur av framleiðsluni á Eiði hevur verði at fáa alt at koyra, soleiðis at úrtøka o.a. kom á eitt nøktandi støði, samstundis sum útgerðin klárar tann effektivitet, sum ætlaður var.

Vit hava í dag eina framleiðslu av frystum makrel- og sildafløkum. Við hesi framleiðslu hava verið gjørdar royndir við royktum vørum, sum eru sendar út til kundar, sum eisini kunnu brúka fryst fløk. Í løtuni royna vit fleiri av hesum vørum av á føroyska marknaðinum eisini, og hava í seinnu hálvu av 2022 sent bæði royktan makrel og roykta sild út til føroyskar kundar, sum eitt lið í at fara víðari til útlendska marknaðin.

Sum nevnt varð í umsóknini, hava vit staðfest ein rímiligan eftirspurning eftir skin-pakkaðum kølivørum, t.e. at tey royktu fløkini verða pakkað í (modificeret atomsfære). Vanliga er haldføri á royktum makrelflaki uml. 14 dagar, men tá hann er pakkaður í skin pakning fer haldføri úr 14 upp til 30 dagar. Hetta hevur við sær, at vøran kann bjóðast út á allar marknaðir í ES sum kølivøra, og ger hetta okkum meira áhugaverdar fyri detail-marknaðin.

Verkætlanin er sett soleiðis saman stigvíst, at innleiðandi eru marknaðarkanningar gjørdar, fyri at nágreina tørvin. Síðan verkætlanarbyrjan 2020 og fram til Nov. 2022 hava vit útvegað nýggjar maskinur og tøkni til hesa framleiðslu. Korona farsóttin gjørdi tað tó sera trupult at menna góða sambond við nýggjar kundar í meira enn 1 ár, m.a. tí at tað ikki hevur borið til at hitt hesar fysiskt. Tí hevur nógv av tíðini verið brúkt til at menna tær vørur, sum hendan verkætlanin tekur útgangsstøðið í.

## Endamál við verkætlanini

At gera kanningar um marknaðaratgongd í ES, Eystur Evropa og Russlandi.
Og fáa til vega hóskandi tøkni til pakking.

*GG: Grundað á spentu støðuna við Russland, hava vit fyribils valt bert at satsa uppá ES (serliga Týskland) og Eystur Evropa annars.*

## Lýsing av verkætlanini í síni heild (fleiri ár)

Í sambandi við at lýsa heildina í verkætlanini varð hendan tíðarætlan gjørd (nú dagførd við 2023):

| | 2021 | | | | 2022 | | | | 2023 | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Virksemi** | **1kv** | **2kv** | **3kv** | **4kv** | **1kv** | **2kv** | **3kv** | **4kv** | **1kv** | **2kv** | **3kv** |
| Marknaðarkanningar | X | X | | X | | | X | | X | / | / |
| Gera kølirúm | | | | | | X | | | | / | / |
| Gera Pakkirúm | | | | | | | X | | | / | / |
| Keypa -Pakkimaskinu | | | | | | | X | | | / | / |
| Pakning | | | | | | | | X | X | / | / |
| Vøruroyndir til útlendskar kundar | X | X | X | X | X | X | X | X | X | / | / |
| Heilsufrøðiligar vørukanningar v.m. | | X | X | X | X | X | X | X | X | / | / |
| Útvega sáttmálar við útlendskar kundar | | | | X | X | | | X | X | X | X |

**(grønt = liðugt) (gult = ígongd)**
Í arbeiðnum við at útvega sáttmálar við útlendskar kundar (niðasta punktið), varð hetta verið útsett nakað, orsaka av korona støðuni. Tá vit levera slíkar krevjandi vørur, er tað neyðugt at møta kundunum fysiskt, og

umrøða vøruna og søluketur v.m. Hetta hevur ikki verið gjørligt meðan samfeløg hava verið afturlatin, so tí er nústani gongd komin á hendan partin, men nú er so full ferð sett á hetta arbeiði. Nevnast kann, at serliga týski marknaðurin er klárur at taka ímóti vøruni, har ætlanin var at byrja eitt samstarv við Horeka v/Carl á Lag. Meiningin er at byrja við smærri handlum, sum so kunnu skapa gróðrarbotn fyri víðari vøkstri. Vøruroyndir eru eisini sendar til aðrar kundar, m.a. í Italia, har vit hava fingið fleiri vinnulig sambond, sum vit væntandi kunnu byggja víðari uppá.

Nú tá vørukanningarnar á føroyska marknaðinum hava koyrt eina tíð, vilja vit seta meira ferð á útflutningin.

*Tað verður framvegis arbeitt víðari við at fáa eitt samstarv í lag við Horeka v/Carl á Lag. Tað hevur verið eitt sindur í einari stillstøðu, eftir at teir vóru nokkso hart raktir av korona støðuni. Málið er at fáa sáttmálar í lag við aðrar útlendskar kundar í september 2023.*

## Stýrisbólkur og/ella fylgibólkur:

**Stýrisbólkur**

| Navn | Fyritøka/stovnur |
|---|---|
| Pól Huus Sólstein | North Pelagic |
| Hans Marius í Byrgi | Sjógæti |
| Viðkomandi persónur úr samstarvsfyritøku | Supermarknaður í ES |

**Fylgibólkur**

| Navn | Fyritøka/stovnur |
|---|---|
| Símun Hammer | VRG |
| Poul Huus Sólstein | North Pelagic |
| Viðkomandi persónur úr samstarvsfyritøku | Supermarknaður í ES |

## Samstarvsfelagir í Føroyum og uttanlands. Leiklutur og arbeiðsbýti partanna millum.

| Stovnur/fyritøka | Persónur | Leiklutur/ábyrgd |
|---|---|---|
| VRG | Símun Hammer | Ráðgeving og skjalprógvan |
| North Pelagic | Poul Huus Sólstein | Søla |
| Sjógæti | Hans Marius í Byrgi | Framleisla |
| Supermarknaður í ES / Horeka | Carl á lag | Ikki staðfest endaligt enn. |

## Fyribils verkætlanarúrslit

Arbeiðið við at fáa neyvari vitan um kundar og marknaðir, og vørutørv er, sum víst omanfyri, væl ávegis, og kemur at vera ein natúrligur partur av virkseminum framyvir. Virkið hevur t.d. eisini (umframt Horeka) havt vitjan av sølumanni frá Hofseth Europe, sum eru áhugaðir í at fáa bæði royktar og frystar vørur til handilsketur í Týsklandi, og hesar ynskja eisini tilboð frá okkum.

Pakkimaskinan frá Multivac (Map-Skinn) er komin upp at koyra og pakningur eisini útvegaður, og nakað er ávegis. Pakkimaskinan verður eisini brúkt til aðrar vørur úr havinum.

Málið hjá okkum var at verða komin inn í eina handilsketu í ES í 2023. Vit eru sera nær hesum máli nú, og meta tí at hetta fer at eydnast, nú vørumenningin er komin so langt, og sølusambond eru gjørd. Byrjað er eisini at selja vørurnar nærri endabrúkaranum uttanlands, nevnliga í Danmark og Stóra Bretlandi. Harumframt selja vit eisini vørurnar á tí føroyska marknaðinum.

**Hvussu verða úrslitini miðlaði út til onnur?**

Úrslitini verða skjalprógvað so hvørt gjøgnum verkætlanina, og miðlaði í føroyskum miðlum, tá onkrir ‘milestones’ verða náddir. Vit hava leingi havt ætlan um at hava opið hús á virkinum ein dag, har fjølmiðlar, samstarvsfelagar og fólk annars kunnu síggja hvat vit eru í gongd við, og í seinastuni hava vit soleiðis havt onkrar stovnar og onkrar skúlaklassar inniá virkinum og víst teimum hvat vit eru í gongd við. Onnur hava eisini víst verkætlanini áhuga.

**Ávegis samandráttur:**

Vit meta framvegis, at hendan verkætlanin er ein týðandi liður í virðisøking av fiski og fiskavørum – serliga til heimsmarknaðin. Við tí menning, sum felagið er í í løtuni, bæði í mun til føroyska og útlendska marknaðin, meta vit at vit hava hava góðar møguleikar fyri at klára okkum framyvir.

Búskaparlig og samfelagslig menning av fiskivinnuni og førleikamenning í øllum liðum:
Ongin ivi er um, at vit við hesi verkætlan virðisøkja føroyska fiskatilfeingið munandi. Í dag er heldur ikki so nógvur førleiki í Føroyum um virðisøking til lidnar pelagiskar vørur. Onki annað føroyskt virkið ger enn, júst tað sum vit gera. Við at vera ein ‘nisjuframleiðari’, har tær ovurhonds stóru nøgdirnar ikki eru avgerandi fyri at eydnast, vóna vit at kunna koma inn á nýggjar marknaðir, ið kanska kunnu virðisøkja okkara vørur fleiri ferðir í mun til at vøran annars vildi verið seld óviðgjørd.

**Listi yvir fylgiskjøl:**

23.

| | | |
|---|---|---|
| Eiði | 04.04.2023 |  |
| Staður | Dagfesting | Undirskrift umsøkjarans |